J.nr.: F.K. 00-04-001
Dato: 23. februar 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

## frá býráðsfundi nr. 02/2006

Ár 2006 tann 23. februar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 16. februar 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen
Gordon M. Petersen møtti sum varamaður fyri Jann Toftegaard, sum hevði forfall.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 03/2006.**

**Mál viðvíkjandi havnabygging á Enninum.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið tilmæli frá havnanevndini frá 09. februar 2006 um ætlaða útbygging av Fuglafjarðar havn, sum nevndin eisini viðgjørdi á fundi tann 07. februar 2006.

Greitt verður frá, at nevndin hevur móttikið upplýsningar frá fyrisitingini um fíggjarligar avleiðingar av øktari lánbyrðu upp á ávikavist 20,0 og 34,0 mió. kr. Um talan verður um økta lánbyrðu upp á kr. 34,0 mió, so krevst loyvi frá landsstýrismanninum í Innlendismálum, hetta sambært § í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Havnanevndin mælir annars til á fundinum 09. februar 2006, at nevndin heldur fast við niðurstøðuna á fundinum 07. februar 2006 og mælir býráðnum til at leingja Ennibryggjuna umleið 100 metrar heimeftir, somuleiðis sum víst verður til ódagfest skriv frá havnameistaranum um hesi viðurskifti.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. februar 2006, og hevur á fundinum viðgjørt møguleikarnar fyri útbygging av havnini við m.a. atliti til bæði fíggjarliga partin og viðurskiftini hjá skipum, sum bæði koma við tungolju-fuelolju og eisini skip, ið hava beinleiðis samband við frystigoymslur, fóðurgoymslu, sand- og rallgoymslu o.a.

Ì sambandi við prinsipployvi, sum býráðið á fundi tann 12. juli 2005 hevur givið stigtakarunum til tungoljuprojektið, kunngjørt við skrivi, dagfestum 19. august 2006, so varð tá roknað við, at ein bryggja varð gjørd fram við økinum niðanfyri

hesar tangar, somuleiðis sum kommunan í 2006 skal fáa til vega niðanfyri standandi fígging:

| | Navn á íløgu: | Møguligt m3 | Kostnaður: | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Egningarmiðstøð | | 2,5 mió | |
| 2 | Grótkeyp Vónin-tunnil | 50.000 | 5,0 mió | |
| 3 | Spreingjan ben á Enninum | | 2,0 mió. | |
| 4 | - Grótsøla havnabygging | | 2,0 mió. | |
| | Útreiðslur íalt: | | **7,5 mió.** | |

Havandi í huga, at ætlanin er at nýta kr. 20,0 mió. til havnabygging tilsamans, so verður mett, at kr. 12,5 mió. eru eftir til gerð av atløgusíðu. Sambært metingina verður kostnaðurin av 70 metrar atløgusíðu kr. 14,0 mió. (uppskot I fyrsta byggistig), so út frá omanfyri standandi tølum verður helst talan um eina atløgusíðu upp á umleið max. 63 metrar.

Um ein atløgusíða við eini longd upp á 100 metrar sambært uppskoti 1 (tilmæli frá havnanevndini) 2. byggistig skal verða framd í 2006, so verður ikki bert talan um ein kostnað upp á kr. 20,0 mió, men skulu í minsta lagi kr. 7,5 mió verða lagdar aftrat sambært omanfyri standandi meting, og tá verður talan um eina lántøku upp á í minsta lagi kr. 27,5 mió.

Fíggjarliga støða kommununar verður tá, um henda ætlan verður gjørd, at lánbyrða kommununar verður økt úr kr. 21.917.766,19 upp í kr. 49.417.766,19 brutto. Tá eru avdráttir av lánum í 2006 upp á kr. 5,080 mió. tiknir við. Um innistandandi peningur upp á kr. 9.296.144,73 (tøkur ídag), so verður talan um eina nettoskuld upp á kr. 40.121.621,46.

Tá ein álíkning (A+B skattur) við 23%-um verður mett at geva kommununi kr. 43.700.000,00, so verður talan um eina skuld svarandi til 0,92 av eini álíkning, so komið heilt upp móti eini álíkning netto í skuld, har kommunan í hvørjum einstøkum føri skal søkja landsstýrismannin í Innlendismálum um neyðug loyvi til lántøku, áðrenn hesi verða upptikin. Tá er frælsið kommununar nærum burtur á fíggjarliga økinum, tá m.a. eitt nú fíggjarætlanir skulu verða góðkendar og ikki bert kunnaðar.

Um talan verður um lántøku upp á kr. 20,0 mió. tilsamans til serstaka oljubryggju á Enninum, keyp av gróti frá Vónini, spreinging av lendinum til tangarnar, og sølu av gróti til havnabyggingina, so verður lánbyrða kommununar økt úr 21.917.766,19 upp í kr. 41.917.766,19 brutto. Tá eru avdráttir av lánum í 2006 upp kr. kr. 5,080 mió tiknar við.

Um innistandandi peningur upp á kr. 9.296.144,73 verður frátrektur, so verður talan um eina nettoskuld upp á kr. 32.621.621,46, svarandi til eina netoskuld við 23%-um upp á slakar 0,75 ferðir eina álíkning.

Sambært tilmælinum frá havnanevndini, so skal øll upp- og avskiping av olju verða framd yvir verandi bryggju + teir 100 metrarnar heimeftir ella á 152 metra bryggjulongd. Tá roknað verður við, at eini 100.000 tons av tungolju framyvir koma at verða upp og avskipað, somuleiðis sum frystivørur bæði skulu verða upp- og avskipað yvir eina bryggju, so verður roknað við sum givið, at mangan verða skip noydd at bíða á fjørðinum ella við aðrar bryggjukantar fyri at sleppa framat.

Tílík viðurskifti metir nevndin verða sera óheppin, tá skip av tílíkum støddum, sum koma til og frá bryggjunum á Enninum, kosta nógv í rakstri og kapitalútreiðslum hvønn einasta dag, og tessvegna ikki kunnu liggja fleiri dagar og bíða eftir at sleppa av við ella koma eftirvøru. Tað verið seg bæði olju og frystivørum.

Sambært upplýsningum frá felagnum undir stovnan, so verður upplýst, at miðað verður fram ímóti, at uppskipaða nøgdin í meðal verður 110.000 tons, meðan avskipaða nøgdin verður 95.000 tons, tá P/F Havsbrún kemur at nýta 15.000 tons.

***Tangaskip***, oð koma við olju lasta millum 8.000 og 15.000 tons, og eru tey í longd millum 120-160 metrar,

***Skip, ið koma eftir olju***, taka í meðal 300 tons hvørja ferð, og er longdin av hesum skipum millum 50 og 170 metrar (eimskip/norrøna).

***Mettar vitjanir***: Tangabátar 12 ferðir um árið, sum liggja í meðal 2 dagar hvørja ferð.

***Atløgutørvur:*** 95.000 tons:300 tons í meðal pr. skip = 317 ferðir + tangaskip 12 ferðir - samantals 329 skip leggja til um árið, svarandi til umleið 1 skip dagliga.

Fyribils inntøkur av gjøldum til Fuglafjarðar havn á hesum grundarlagi verða leystliga mettar til kr. 1,5 mió.

Nevndin er av teirri sannføring, at besta loysnin er í fyrstu atløgu at gera eina oljubryggju á enninum niðan fyri komandi tungoljutangar við eini longd upp á max. 70 metrar, og kunnu oljuskip tá leggja beinleiðis at oljubryggju, meðan skip við frystivørum kunnu verða avgreidd yvir verandi bryggju niðan fyri Bergfrost og tunnlarnar.

Sum annað byggistig eigur henda at verða longd, tá fíggjarligarn umstøður eru til tað.

***Tilmæli frá havnanevndini:***

Havnanevndin hevur havt málið um havnabygging til viðgerðar á fundi tann 09. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at hildið verður fast um niðurstøðuna hjá havnanevndini á fundi 7. februar 2006, har mælt verður býráðnum til at leingja Ennibryggjuna umleið 100 metrar heimeftir, og vísir til skriv frá havnameistaranum hesum viðvíkjandi.

***Tilmæli frá fíggjarnevndini:***

Nevndin er samd við havnanevndini um, at nýttar eiga at verða í mesta lagi kr. 20,0 mió. til útbygging av Fuglafjarðar havn í 2006. Hinvegin mælir nevndin einmælt býráðnum til, at sjálvstøðug oljubryggja upp á max. 63 metrar verður bygd á økinum niðan fyri komandi tungoljutangar sambært uppskoti nr. I frá teknisku deild kommununar við einum max. kostnaði upp á kr. 12,5 mió. Grundgevingin er, at nevndin metir stóra skipaferðslu á økinum, og skipini kunnu best og skjótast verða avgreidd við 2 bryggjum, einari til olju og eini til frystivøruro.a.

Hinvegin skal fíggjarnevndin taka atlit til fíggjarligu viðurskifti kommununar, og grundað á fíggjarligu útgreiningarnar av støðu kommununar við árslok 2006, so verður ikki møguleiki fyri at gera størri íløgu í havnina enn kr. 20,0 mió, tá

kommunan í komandi árum stendur fyri stórum nýíløgum á fleiri økjum, og sum koma at verða fíggjaðar yvir kommunala raksturin og møguliga partvíst við lántøku.

Annars er nevndin av teirri sannføring, at havnabyggingin ikki á nakran hátt skal koma at ávirka kommunuskattaprosentið, men at íløgan framyvir skal verða rindað av øktum havna-brúgva-vatn- vøru og leigugjøldum.

Nevndin mælir somuleiðis til, at býráðið gevur býrásleiðsluni heimild til at taka upp samráðingar við fíggjarstovnar um lántøku upp á tilsamans kr. 17,5 mió. til havnabyggingina, spreinging og grótkeyp, meðan heimild at taka kr. 2,5 mió. í láni til egningarmiðstøðina er veitt av býráðnum í sambandi við góðkenning av fíggjarætlan kommununar fyri 2006.

**Avgerð:**

Samtykt varð eftir uppskoti frá Signari á Brúnni, havnanevndarformanni at beina málið aftur í havnanevndina til viðgerðar. Málið verður lagt fyri eykabýráðsfund hósdagin tann 2. mars 2005 kl. 17.00 til endaliga støðutakan. (9-0).

**Mál nr. 04/2006.**

**Viðvíkjandi byggjan av nýggjum dagstovni í kommununi.**

Sosiala nevndin hevur á fundi tann 06. februar 2006 havt mál um byggjan av nýggjum dagstovni til viðgerðar, og varð nevndin samd um at leggja uppskot til viðgerðar fyri býráðsfundin, sum hildin verður 23. februar 2006 um hesi viðurskifti.

Nevndin er av teirri sannføring, at besta fakliga loysnin á barnaansing uttan fyri heimini er á stovni/um, har fakfólk hvønn dagtaka sær av børnum, sum av foreldrum eru latin upp til teirra til m.a. partvísa uppaling. Tí er nevndin samd um, at kommunan sambært dagstovnalógini eigur at miða fram ímóti, at ein dagstovnur aftrat til umleið 50-60 børn verður bygdur í kommununi.

Nevndin er samd um, at hesin eigur at verða bygdur á Kambsdali. Tosað hevur verið um at bygt ein kombineraðan dagstovn og frítíðarskúla, men nevndin er hinvegin av teirri áskoðan at hesi viðurskifti eiga at verða kannað nærri, havandi í huga, at fleiri áskoðanir eru um, hvar ein tílíkur skal verða bygdur antin inni í Fuglafirði ella á Kambsdali.

Nevndin hevur aftur viðgjørt málið á fundi tann 13. februar 2006, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at taka undir við, at nevndin arbeiðir víðari við barnagarsætlanini, og kemur nevndin eftir ætlan at leggja eitt fullfíggjað álit fyri fíggjarnevndina og býráðið til endaliga støðutakan í inniverandi ári.

Nevndin mælir annars til, at møgulig fíggjarlig prioritering á fíggjarætlanum kommununar 2007-2009 til omanfyri nevndu bygging kundi verið raðfest á niðanfyri standandi hátt:

Fíggjarárið 2007: Avseting til peningi projektering.
Fíggjarárið 2008: Avseting av helvt av samlaða byggikostnaðinum.
Fíggjarárið 2009: Avseting av hini helvtini av samlaða byggikostnaðinum til liðuggerð.
Fíggjarárið 2010-: Avseting til rakstur av stovninum.

Sum normeringarnar verða eftir 1. august 2006, so verður dagstovnurin uppnormaður úr 60 upp í 76 pláss 1/1 tíð, dagrøktin niðurnormerað úr 42 niður í 35 pláss 1/1 tíð, meðan Frítíðarskúlin hevur eina normering upp á áleið 36 pláss 1/1 tíð. Talan er sostatt um tilsamans 147 ansingarpláss 1/1 tíð.

Um nýggjur dagstovnur verður bygdur, so merkir gongdin alt annað líka, at dagrøktin verður munandi niðurnormerað, meðan ansingarstovnarnir verða uppnormeraðir. Annars verður í hesum sambandi eisini miðað fram ímóti sum sera grundgevandi at hava tilboð til øll foreldur um ansing, við atliti til at fáa borgarar at seta seg niður í kommununi.

**Avgerð:**

Tilmælið frá sosialu nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 05/2006.</u>**

**Uppskot til leigusáttmála fyri Frítíðarskúlan.**

Sosiala nevndin móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 31. januar 2006 um uppskot til leigusáttmála millum K.F.U.M. skótarnar í Føroyum og kommununa fyri bygning á matr. nr. 878 á Kambsdali (Skótahúsið).

Talan er um leigumál í 1 ár frá 1. februar 2006 at rokna fram til 31. januar 2007. Tó kann leigumálið verða uppsagt við 1 mánaða ávarðing frá kommununar síðu í leigutíðarskeiðnum.

Sambært § 9, stk. 1 verður leigan hækkað við kr. 10.000,00 úr kr. 90.000,00 upp í kr. 100.000,00, meðan útreiðslurnar sambært § 12, sum skótarnir skulu endurrinda kommununi fyri teirra nýtslu av húsunum (olja, streym, reingerð og brúkslutir) kr. 10.000,00, móti kr. 35.003,35 fyri 2005-2006.

Sambært skrivi frá Brunaumsjón Landsins, dagfest 187. januar 2005, so verður viðmerkt undir pkt. 1: "Í húsum við 2 hæddum og kjallara, skal kjallarin verða sjálvstøðug brunaeind. Skilagólvið yvir kjallara, eins og berandi konstruktiónir inni í kjallara, skulu verða í minsta lagi úr BD-húsaluti 60".

Sostatt skuldu hesar ábøtur verða framdar, um bygningurin skuldi verið nýttur sum ansingarstovnur undir dagstovnalógini, men eru ásetingarnar ikki galdandi fyri skótavirksemi við møguligum sovandi gestum.

Kommunan hevur havt leigumálið í gott og væl 1 ár, og eru omanfyri nevnda krav frá Brunaumsjónini ikki framt. Á fundi millum umboð fyri skótarnar og kommununa tann 31. januar 2006 gekk greitt fram, at skótarnir ikki vóru sinnaðir at fremja hesa íløgu innanveggja. Í hesum sambandi vístu teir til § 2, stk. 1, sum sigur, at leigarin ber kostnaðin av neyðugum umvælingum, sum standast av virkseminum hjá leigara.

Kommunan metti, tá leigumálið varð formaliserað 9. februar 2005, at omanfyri nevnda arbeiðið skuldu skótarnir gera og rinda.

Mett verður, at kostnaðurin av arbeiðinum kemur at kosta umleið kr. 40.000,00. Sambært telefonsamtrøðu millum býarverkfrøðingin og Jan á Argjaboga fyri skótarnar, so nevndi hesin, at ein loysn kundi verða, at um talan varð um eitt leigumál upp á 1 ár, so vilda hann mæla skótunum til, at teir komu at rinda ½ og kommunan eina ½, t.v.s. kr. 20.000,00 í part.

Um talan varð um leigumál yvir 2 ár, so vildi hann skjóta upp, at skótarnir rindaðu 1/3 og kommunan 2/3, men um leigumáli varð gjørt yvir 3 ár, so kom kommunan at rinda allan kostnaðin.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 13. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna leigusáttmálan galdandi í 1 ár frá 1. februar 2006 at rokna fram til 31. januar 2007.

Somuleiðis verður mælt til, at kommunan rindar ½ av gjaldinum fyri bjálvingina vm., sum mett er at kosta umleið kr. 40.000,00. Sostatt verður kommununar partur umleið kr. 20.000,00.

Sosiala nevndin samtykti at beina leigumálið í fíggjarnevndina til viðgerðar, grundað á at talan er um peningajáttan til lsjálvt leigumálið og til neyðugar umvælingar fyri at fáa bygningin góðkendan av Brunaumsjón Landsins sum ansingarstovn.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 15. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevndini frá 13. februar 2006. Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til at taka unir við, at kommunan rindar kr. 20.000,00 fyri umvælingina, sum kravd er av Brunaumsjón landsins, og at peningurin verður fingin til vega av húsaútreiðslum hjá Frítíðarskúlanum konto 503000.

**Avgerð:**

Tilmælini frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (9-0).

**Mál nr. 06/2006.**

**Umsókn frá Katrin og Kristian Martin Petersen um útgravingarloyvi/byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503s í Fløtugerði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Katrin og Kristian Martin Petersen, dagfest 22. januar 2006 um útgravingarloyvi/byggiloyvi til sethús á matr. nr. 503s sunnan fyri vegin í Fløtugerði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis ***at***:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Parkeringspláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og skal hetta verða gjørt, áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
3. Veggurin móti vegnum í Stovugerði verður gjørdur í samráð við teknisku deild kommununar.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkirnar, áðrenn hesar verða veittar út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða sambært leiðbeining frá heilsufrøðisligu starvsstovuni og settur niður sambært vegleiðing um rottangauppseting.
6. Eisini skal rundskriv frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni, dagfest 02. juli 1998 um nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
7. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deildini, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðtiknar av teknisku deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
8. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

9. Útgrevstrar- og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis, at fortovskantar og vegur ikki verða skaddir, og einki tilfar frá útgrevstrinum eigur at verða sløtt eftir vegnum og á landsvegin, har moldin verður løgd á Kambsdali. Um hetta kemur fyri, skal hetta verða tikið upp beinanvegin og møguligir skaðar umvældir.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 07/2006.**

**Umsókn frá Marjun Djurhuus og Magna Joensen um byggiloyvi til bilhús og flytan av spælhúsi frá Norður í Gerði 44 til Sevdalsveg 18.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Marjuni Djurhuus og Magna Joensen, dagfest 14. februar 2006 um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143bo og loyvi at flyta spælihús frá Norður í Gerði 44 niðan á Sevdalsveg 18.

Spælihúsið skal verða nýtt til spælihús og seinni til urtagarðs- og brenniskúrð.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. februar 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at loyvið verður givið til bygging sambært innsendar tekningar.

Frálopið frá takvatni, dreni og túni skal verða veitt í felags regnvatnsleiðingina. Kloakkleiðingarnar skulu verða sýnaðar av teknisku deild kommununar, áðrenn tær verða tyrvdar.

Bygningurin skal ikki verða nýttur til annað endamál enn bilhús.

Byggiloyvið hevur gildi í 2 ár og gongur út, um ikki er bygt innan 6. januar 2008.

Eisini mælir tekniska nevndin til, at loyvið verður givið til at flyta spælihúsið niðan á Sevdalsveg.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr.08/2006.**

**Umsókn frá SP/F Í Støð um byggiloyvi til bygning oman á kappróðrarneystið.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá SP/F Í Støð, dagfest 12. februar 2006 um byggiloyvi til bygning oman á kappróðrarneystið á matr. nr. 239ad. Bygningurin er í tveimum hæddin + loft.

Veghæddin er ætlað til 1 ella 2 handils-/skrivstovuhølir. 2 hædd til 3 íbúðir/skrivstovuhølir, meðan 2 íbúðir verða í loftshæddini.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. februar 2006, og heldur nevndin ætlanina verða áhugaverda.

Vísandi til ásetingarnar fyri økið kunnu íbúðir ikki verða bygdar á økinum. Út frá hesum kann byggiloyvi ikki verða givið. Í sambandi við eina endaliga málsviðgerð er eisini neyðugt við meira nágreiniligum tekningum.

Nevndin mælir tí býráðnum til, at arbeitt verður víðari við byggiætlanini fyri økið frá Bedingini og norður til Arbeiðsmannafelagið, soleiðis at handils- o skrivstovur verða í veghædd og íbúðir kunnu verða í erva, og at neyðugar broytingar í byggisamtyktini hesum viðvíkjandi verða gjørdar.

**Avgerð:**

Sí samtykt undir málið nr. 09/2006 undir punkti 2.

**<u>Mál nr. 09/2006.</u>**

**Uppskot um broytan av byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kambsdal.**

1. Á fundi í teknisku nevndini tann 20. januar 2006 verður mælt býráðnum til, at frílendið millum matrikulin hjá Harry á Lakjuni og Ingibjørn Eldevig verður broytt til bústaðarøki.

2. Á fundi í nevndini tann 17. februar 2006 verður mælt býráðnum til at gera broytingar viðvíkjandi "miðstaðarøkinum", har víst verður til mál nr. 00-49-092 SP/F Í Støð, soleiðis, at handil og skrivstovur verða í veghædd og íbúðir í erva.

3. Tá ivamál er reist, um tað er rætt at gera spæliplláss á øki "E" almennir stovnar á Kambsdali, mælir nevndin til, at ásetingarnar verða broyttar soleiðis, at spælipláss kann verða gjørt á hesum øki.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um tilmælini frá teknisku nevndini í trimum. Uppskot 1 varð einmælt samtykt. Uppskot 2 varð samtykt við 8 atkv. Fyri og 1 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddi Elisabeth D. Eldevig. Uppskot 3 varð einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 10/2006.</u>**

**Uppskot um at normera eitt starv sum vatn- og kloakkmeistari.**

Vísandi til stóra arbeiðsbyrðu hjá arbeiðsformanninum við 11 monnum í arbeiði heldur tekniska nevndin, at arbeiðið sum vatn- og kloakkmeistari eigur at verða normerað sum sjálvstøðugt starv.

**Avgerð:**

Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Tórfríður Abrahamsen

Elisabeth D. Eldevig

Petur Abrahamsen

Eyðun á Lakjuni

Jón Nolsøe Olsen

Gordon M. Petersen

Sigurð S. Simonsen